## Calderon skiftir út




Forsetin í Meksiko, Felipe Calderon, heldur, at tað gongur ov seint við at basa rúsevnaharkaliðunum, og misnøgd forsetans hevur nú kostað ákæranum Eduardo Medina Mora starvið. Hann hevur havt ábyrgdina av átøkunum ímóti teimum harðrendu rúsevnaharkaliðunum, men hevur sambært forsetanum ikki fingið nóg mikið burturúr. Tann nýggi ákærin er fyrrverandi yvirmaður í løgregluni, og hann fær úr at gera. AP skrivar, at hvønn dag doyggja umleið 20 fólk í stríðnum millum myndugleikarnar og rúsevnaharkaliðini og millum harkaliðini sínamillum.

## Ísland stuðlar mentan

Ísland er millum tey lond, sum brúka lutfalsliga nógvar pengar til mentamál. Ein uppgerð frá 2006 vísir, at tað árið brúktu íslendingar átta prosent av bruttotjóðarframleiðsluni til mentamál. Til samanberingar nevnir Morgunblaðið, at hetta árið brúktu OECD-londini í meðal 6,1 prosent til mentamál. Sagt verður, at síðani 2003 hevur íslendska játtanin til mentamál verið óbroytt. Í 2006 fóru 18,1 prosent av almennu játtanini til mentamál. Í OECD-londunum var játtanin 13,3 prosent í meðal.

# ammaná



*- Trupulleikin er, at jú minni vit vilja tosa um sjálvmorð, jú meir einsamøll og avbyrgd kenna tey sjálvmorðshóttu og teirra avvarðandi seg. Soleiðis upplivdi eg tað eisini, tá beiggi mín gjørdi sjálvmorð, sigur íslendski leikstjórin Egill Heiðar Anton Pálsson*




*Í hálvan annan tíma vendir sjónleikarin Gunnvá Zachariassen ranguna út í leiklutinum sum ungan kvinnan, sum stýrir beint móti sálarligu avgrundini*

Fyri at geva eina so sanna mynd av hesum veruleika, sum gjørligt, hevur leikbólkurin sýnt leikbrot fyri Tormóði Stórá, sálarlækna, sum eisini í mong ár hevur arbeitt við sjálvmorðshóttum sjúklingum

- Vit vildu tryggja okkum, at leikurin eisini er realistiskur og sambært sálarlæknanum er hetta ein sera veruleikanær mynd av sjúkugongdini, tá tað snýr seg um tunglyndi og sjálvmorð, sigur leikstjórin.

At leikurin verður sýndur í Samkomuhøllini úti á Landssjúkrahúsinum flytur søguna enn eitt fet nærri veruleikanum. Tað eru hesar gráligu bygningarnar, tey tunglyntu og sjálvmorðshóttu oftast møta, hesi hurðaklamsini tey hoyra og hendan luktin, tey kenna í næsagluggunum. Og eins og tey, fær áskoðarin tá ikki runnið undan longur, tí tankin um, at "tað kundi verið eg" er kanska longu farin at spøkja, tá hurðin inn til Samkomuhøllina á Landssjúkrahúsinum letur aftur ....

# Seinasti leikurin hjá Sarah Kane

*"Klokkan 4.48*
*tá vónloysið vitjar*
*havi eg hug at heingja meg sjálva*
*meðan eg hoyri mín elskara anda*

*eg vil ikki doyggja"*

(brot úr leikinum *4.48 Psykosa*)

*4.48 Psykosa* er seinasti leikurin, sum enska Sarah Kane skrivaði, áðrenn hon gjørdi sjálvmorð í 1999 bert 28 ára gomul. Hóast hon stríddist við tunglyndi í mong ár og tvær ferðir var innløgd á sálarsjúrkahús, skrivaði hon alt sítt vaksna lív. Eftir henni liggja ein røð av slóðbrótandi og nógv uppsettum leikverkum, sum hava verið spæld um alt Europa: *Crave, Cleansed, Blasted, Pheadra's Love* fyri at nevna nakrar. Umframt leikurin *4.48 Psykosa*, sum varð funnin eftir at hon var deyð, og sum mong fata sum hennara sjálvmorðsbræv.

Sarah Kane hoyrdi til unga ættarliðið av bretskum leikritahøvundum, sum í 1990'unum stormaðu fram við progressivum og kontroversiellum samtíðarleikum. Hesir leikir fingu felagsheitið In Yer Face Drama tí teir vóru óvanliga ráir, skakandi, ópoleraðir og ágangandi í innihaldi, máli og skapi.

Gunnar Hoydal hevur týtt leikin *4.48 Psykosa* úr enskum til føroyskt.

**Luttakarar**

| | |
|---|---|
| Leikstjórn: | Egill Heiðar Anton Pálsson |
| Týðing: | Gunnar Hoydal |
| Leikarar: | Gunnvá Zachariasen og Hjálmar Dam |
| Ljóssnið: | Egil Barclay Høgenni Hansen |
| Tónleikur: | Rasmus Rasmussen |
| Myndir: | Marianna Mørkøre |
| Framleiðsla: | Oddvá Nattestad |

Leikurin verður frumsýndur í Samkomuhøllini á Landssjúkrahúsinum leygardagin 12. september klokkan 20



*Mong fata leikin* ***"4.48 Psykosa"*** *sum sjálvmorðsbrævið hjá leikhøvundandum Sarah Kane, sum tók lívi av sær bert 28 ára gomul*